# VÆLKOMIN FALDARI HJÁ BÝLINGSHÚSINUM UNDIR BRÚNNI



## Vælkomin í Býlingshúsið undir Brúnni

Vit gleða okkum at bjóða tykkum vælkomin og at læra tykkum og tykkara barn at kenna. Tá tit sum foreldur byrja á stovninum, vita vit, at nógvir tankar og spurningar fylgja við. Hesin faldarin er gjørdur við tí fyri eyga, at geva tykkum eina so góða byrjan í Býlingshúsinum undir Brúnni sum gjørligt. Í hesum faldaranum kunnu tit lesa um okkara námsfrøðiliga virðisgrundarlag, foreldrasamstarv, stovnsbyrjan, gerandisdagin á stovninum og ymisk onnur praktisk viðurskifti.

Okkara ynski er, at tíðin í vøggustovu og barnagarði skal vera sermerkt av spæli, menning og spennandi upplivingum í samveru og felagsskapi við onnur børn og vaksin. Fyri flestu børn er tað ein stór broyting at byrja á dagstovni, og tí leggja vit stóran dent á, at byrjanin hjá tykkara barni bæði verður trygg og spennandi.

**Um okkum**

Í Býlingshúsinum undir Brúnni eru fýra stovur – tvær barnagarðsstovur og tvær vøggustovur:

Sóljustova (3-7 ár) – tlf 21 91 87

Smærustova (3-7 ár) – tlf 21 91 86

Børkustova (0-3 ár) – tlf 21 91 94

Brobberstova (0-3 ár) – tlf 21 91 85

Leiðari: Eyð Skúvadal Johannesen – tlf 319180

Vit eru ein stovnur, ið fyrst og fremst ynskir at taka atlit til, at øll børn eru ymisk, og at tørvirnir hjá einstaku børnunum tískil eisini eru ymiskir. Vit stremba eftir at skapa ein góðan, innihaldsríkan og mennandi gerandisdag fyri tykkara børn, umframt at vit leggja stóran dent á at hvørt einstakt barn verður sæð, hoyrt og viðurkent.

Vit virka fyri at skapa ein burðardyggan og umhvørvisvinarligan gerandisdag saman við tykkum og tykkara børnum. Hetta gera vit millum annað við at avmarka nýtsluna av einnýtis tilfari, vit hava endurnýtiligar posar til skitnu klæðini hjá børnunum, vit sortera rusk eftir besta førimuni, umframt at vit endurnýta ymiskt tilfar í samband við kreativt virksemi.

**Námsfrøðiliga virksemið á stovninum**

Námsfrøðiliga arbeiðið á stovninum er í stóran mun bygt á relatiónsarbeiði. Fyri okkum hevur tað týdning, at góðar relatiónir áhaldandi verða uppbygdar og styrktar í gerandisdegnum, tí at vit vita, at tað er við til at økja um trivnaðin og tryggleikan hjá børnunum.

Harumframt ynskja vit at vera rúmlig og síggja ymisleikar sum eina styrki í okkara arbeiði.

Børn mennast og læra ígjøgnum spæl, og tí er tað umráðandi fyri okkum, at vit eru “spæliklók” og skapa góðar karmar fyri spæli – bæði inni og úti.

***“Lek som om livet står på spil, fordi det gjør det”***

- Trude Anette Brendeland

Vit skipa okkara virksemi á stovninum út frá barnabólkinum, og vit taka støði í einstaka barninum, teirra áhuga og teirra menningarstøði. Vit eru úti nærum hvønn dag, tí at vit vita, at tað er gott fyri heilsuna hjá børnunum.Harumframt er tað við til at gera teirra kropsligu menning meira fjølbroytta, og tað gevur teimum eitt størri frírúm at breiða seg út í teirra fría spæli.

**Felags virksemi á stovninum**

Vit leggja dent á, at eitt gott samstarv skal vera ímillum ymisku stovurnar á stovninum. Umframt samstarvið í gerandisdegnum, hava vit eina felags sangløtu hvønn fríggjadag, vit fara túr saman í fimleikahøll eina ferð um vikuna, og vit hava nøkur felags kreativ verkstøð ígjøgnum árið, umframt at vit á vári hava eina blómuviku, har øll børnini hava leykir við á stovnin, sum vit saman planta í garðin.

Á hvørjum ári gera vit eitt sindur eyka burturúr, tá høgtíðir og serligir dagar eru. Millum annað páskir, jól og føstulávint. Harumframt hava vit nøkur tiltøk ígjøgnum árið, ið tit sum foreldur eisini verða boðin við til, millum annað garðdag og ein felags foreldrafund.

Fyri meira kunning um okkara námsfrøðiliga arbeiði og virksemi ígjøgnum árið, verður víst til virkisætlanina, ið hongur í inngongdini til hvørja stovu. Eisini ber til at lesa nærri um námsfrøðiliga arbeiðið á stovninum á www.torshavn.fo.

**Føðingardagar**

Tá barnið hevur føðingardag flagga vit, og barnið verður hátíðarhildið, so at tað kennir seg serstakt tann dagin. Sum stovnur hava vit valt, at børnini ikki bjóða nakað etandi hendan dagin. Hetta fyri at tryggja, at øll børnini verða hátíðarhildin á sama hátt, umframt fyri at taka atlit til børn við ovurviðkvæmi o.a.

**Foreldrasamstarv**

Foreldrasamstarvið er ein týðandi partur av okkara námsfrøðiliga arbeiði, og vit leggja stóran dent á gjøgnumskygni og týðiligt

samskifti við øll foreldur í gerandisdegnum. Um tað er okkurt, ið tit undrast á ella ikki eru heilt nøgd við, hevur tað stóran týdning fyri okkum, at tit venda tykkum til okkara, so at vit fáa tosað opið saman fyri at loysa møguligar trupulleikar.

**Tá barnið byrjar á stovninum**

Sum áður nevnt kann tað vera ein stór broyting fyri eitt barn, tá tað skal byrja á dagstovni, og tískil leggja vit stóran dent á, at barnið fær eina góða og bleyta byrjan. Okkara royndir eru, at tað er lættari hjá barninum at trívast, um tíð verður sett av til innkoyring. Barnið skal stigvíst byrja við at vitja nakrar ferðir saman við einum av tykkum, áðrenn tað byrjar at vera sjálvt á stovninum. Barnið hevur best av at hava stuttar dagar ta fyrstu tíðina á stovninum, fyri at broytingin ikki gerst ov brá fyri barnið.

Vit vita, at nógvir tankar ofta fylla hjá tykkum foreldrum ta fyrstu tíðina, og tí eru tit altíð vælkomin at ringja og hoyra, hvussu barnið hjá tykkum hevur tað. Starvsfólkini eru altíð til reiðar at tosa við tykkum um tykkara barn, tá tit hava tørv á tí.

Eitt gott foreldrasamstarv er við til at økja um trivnaðin hjá barninum. Barnið verður trygt, tá foreldrini útstrála, at her er gott at vera.

**Dagliga gongdin á stovninum**

Kl 7.30: Stovnurin letur upp
Kl 9: Samling við sangi og práti, børnini fáa frukt og knekkbreyð
Kl 10: Ymiskt virksemi, túrar og spæl
Kl 11.30: Børnini eta matpakka, sum tey hava við heimanífrá
Kl 12: Vøggustovubørnini sova lúr
Kl 14.30: Stovnurin bjóðar millummála
Tíðin eftir millummálan er vanliga fylt við fríum spæli – antin úti ella inni.
Kl 17: Stovnurin steingir

Tá tit koma um morgunin er umráðandi, at tit geva tykkum stundir at fylgja barninum heilt inn og siga góðan morgun. Um eitthvørt er, sum kundi verið viðkomandi hjá okkum at vita, er tað umráðandi, at tit siga okkum frá, so at vit betur skilja barnið. Hetta kundi til dømis verið ein ring nátt, sjúka í familjuni, flyting ella annað, ið kann ávirka barnið.

Um barnið hevur ein frídag, er sjúkt ella møtir seint onkran dag, ynskja vit, at tit boða okkum frá, antin á foreldraglugganum ella við at ringja/senda sms til stovutelefonina.

## Sjúka

Um barnið er sjúkt, skal tað vera heima, til tað er væl fyri og orkar at vera á stovni saman við øllum hinum børnunum aftur. Ynskiligt er um tit kunnu boða starvsfólkunum frá, tá barnið er sjúkt. Um einhvør sjúka, ið smittar, gongur á stovninum, fáa øll foreldrini boð um tað.

Um eitt barn er illa fyri og ikki megnar at vera á stovninum, ringja vit til tykkum og boða tykkum frá. Vit geva ikki børnum heilivág.

## Klæðir

Vit eru nógv úti, og tí er umráðandi, at barnið hevur góð og heit klæðir á stovninum, ið passa til føroyska veðurlagið. Neyðugt er, at barnið hevur nokk av skiftiklæðum frá innast til uttast, helst tvey sett. Harumframt viðmæla vit, at klæðini hjá børnunum eru praktisk og góð at flyta seg og spæla í.

<u>Minnist til at seta navn í øll klæðini.</u>

## Foreldragluggin

Neyðugt er, at tit fáa foreldragluggan virknan sum skjótast, tá tit hava fingið barnið innskrivað á stovnin. Foreldragluggin verður nýttur til kunning og dagligt samskifti við dagbók og myndum.

Tit kunnu boða starvsfólkum frá um sjúku, frídagar o.a. á foreldraglugganum ella við at skriva ella ringja á telefonnummarið hjá stovuni hjá tykkara barnið.

## Nær stovnurin er stongdur

Stovnurin er stongdur í tríggjar vikur um summarið – í viku 29, 30 og 31, og ímillum jól og nýggjár.

Vit hava tveir ráðleggingardagar um árið, ein um várið og ein um heystið, tá tekur stovnurin ikki ímóti børnum, og vit boða frá hesum 2 mánaðar áðrenn.

## Foreldraráð

Á hvørjum ári er val av foreldraráði. Ráðið er mannað av 5-7 limum, og valið fer vanliga fram á foreldrafundinum, ið verður hildin um heystið. Viðtøkur fyri foreldraráðið eru at finna á www.torshavn.fo

Tit eru altíð vælkomin inn til eitt prát á skrivstovuni ella seta tykkum í samband við Eyð á tlf: 319180 ella við at senda ein teldupost til eydsku@torshavn.fo ☺